Tær fátæku kommunurnar liggja enn á pínubeinkinum

Ta› hevur gingi› illa at avgrei›a saneringina hjá teimum ringast støddu kommununum. Og nú hevur ógreitt lógarsmí› hjá landsst‡rinum seinka› málinum enn meir

KOMMUNUSKULD
Áki Bertholdsen

Tær fátækastu kommunurnar í Føroyum ver›a enn hildnar á pínubeinkinum.

Annars hevur ta› leingi tókst sum ein sanering av kommunuskuldini var á veg.

Løgtingi› hevur samtykt eina lóg um at hjálpa teimum ringast støddu kommununum burtur úr skuldini. Landskassin skuldi betala 25 milliónir til endamáli›. Restin skuldi takast úr Kommunala Ve›haldsgrunninum.

Men nú ta› kemur hartil, at peningurin skal gjaldast út, ger Gjaldsstovan vart vi›, at heimildirnar at betala teimum ringast støddu kommununum úr grunninum, eru ógrei›ar.

Leivur Hansen, sum er forma›ur í st‡rinum fyri grunnin, sigur, at ein uttanvelta›ur lógfrø›ingur var› eisini bi›in um at gera ein úrskur› í málinum og hann kom til somu ni›urstø›u. Og ta› sama sigur grannsko›arin hjá grunninum. Sostatt kundi grunnurin vænta sær endurgjaldskrav frá summum kommunum, um peningur var útgoldin úr grunninum til saneringina.

Sostatt var vandi fyri, at tær kommunur, sum áttu pening í grunninum, fóru at leggja endurgjaldskrav, um peningur í grunninum var› brúktur til at sanera tær mest skuldarbundnu kommunurnar vi›.

Tí gjørdi st‡ri› fyri grunnin av, ikki at betala úr grunninum, fyrrenn allar kommunurnar høvdu vátta›, at tær gó›tóku, at peningurin var› brúktur til endamáli›.

St‡ri› fyri ve›haldsgrunnin vil nú hava at at vita, um landskassin vil átaka sær møgulig endurgjaldskrøv frá kommunum, sum ikki vilja gó›taka, at peningur úr ve›haldsgrunninum ver›ur brúktur til at sanera tær fátækastu kommunurnar vi›. Tvøroyri er ein av teimum kommununum, sum er hart rakt av hesum

Seinasta freist hjá kommununum at senda st‡rinum hesa váttan, var t‡sdagin.

Tá i› hendan váttanin var komin, skuldi st‡ri› so leggja peningin út.

Fingu fáar váttanir

Men mikudagin uppl‡sti umsitingin hjá grunninum, at ta› er bara ein minniluti av kommununum, sum hava svara› aftur.

Eitt nú eru ta› eisini stórar og mi›alstórar kommunur, sum ikki hava lati› vi› seg koma, umframt nógvar av teimum smáu.

Hinvegin eru ta› nakrar kommunur, sum hava svara›, at freistin til at vi›gera máli› var ov stutt og tí hava tær ikki hava havt stundir til at svara›.

Ætlanin var kortini at avgrei›a saneringina mikudagin vi› teimum váttanum, sum vóru komnar.

Forma›urin í st‡rinum fyri grunnin sigur, at grunnurin hevur eisini fingi› eina váttan frá Anfinn Kallsberg, løgmanni, sum umsitur kommunumál. Og hann bo›a›i frá, at heimildirnar at gjalda út eftir lógini, vóru ílagi og at grunnurin tískil kundi avgrei›a saneringina eftir lógini, sum Løgtingi› samtykti.

St‡ri› fyri grunnin hev›i tískil aftur fund mikudagin Men heldur ikki tá eydna›ist at fáa saneringina avgreidda.

Leivur Hansen sigur, at semja er um ikki at siga naka› frá fundinum fyri ikki at gera ta› enn fløktari. Hann sigur, at grunnurin vil ikki avgrei›a máli›, fyrrenn ein fundur hev›i veri› vi› løgmann um, hvussu máli› skal avgrei›ast.

Hann vil ikki siga, hvat fundurin vi› Løgmann skal vera um.

Ta› skilst kortini á fólki, sum hava vi› máli› at gera, at st‡ri› fyri grunnin vil hava at vita, um landskassin er sinna›ur at átaka sær møgulig endurgjaldskrøv frá kommununu, sum ikki gó›taka, at peningurin í ve›haldsgrunninum ver›ur brúktur til endamáli›.

Men sum ta› framgongur av samrø›u vi› Karsten Hansen, fíggjarmálará›harra a›rasta›ni í bla›num, kemur ta› als ikki upp á tal

Umbyggingin í Haldarsvík

Øll sóknin stendur saman um Avhaldshúsi› í Vík og stu›lar, hvørja fer› okkurt tiltak er

Í greinini, vit skriva›u í t‡sdagsbla›num um umbyggingina av Avhaldshúsinum í Haldarsvík, eru nakrar reglur av migáum dotnar burturímillum.

Í samrø›u vi› Sosialin, seg›i Paulivar Johansen, forma›ur í Haldarsvíkar Avhaldsfelag, at í samband vi› basarin, tey høvdu fyrr í ár, fekk felagi› rættiliga nógvar gávur. Í tí sambandinum nevndi hann bygdirnar í sóknini, Tjørnuvík og Langasand.

Onkusvegna er bara Tjørnuvík komin vi› í greinina, helst av ósketni bla›mansins.

Paulivar Johansen, forma›ur í Haldarsvíkar Avhaldsfelag, seg›i, at fólk í sóknini vóru sera røsk at stu›la felagnum. Bæ›i í Tjørnuvík og á Langasandi var› stórt arbei›i gjørt upp undir basarin. Bæ›i vi› beinlei›is at geva gávur og vi› arbei›i til at gera lutir til eydnuhjóli›.

Til dømis var onkur av »fyrisprákarunum« í bindiklubbanum, sum tey nevna ta›, júst av Langasandi.

ej

Kanna umstø›urnar í Koltri

Vinnumálast‡ri› hevur bi›i› Landsverkfrø›ingin kanna umstø›urnar kring infrastrukturin í Koltri

BYGDATÍ‹INDI
Edvard Joensen

Infrastruktururin í Koltri skal kannast fyri at finna fram til, hvussu fornminnini best kunnu var›veitast, samstundis sum so liviligt sum til ber ver›ur í oynni.

Ta› ljó›ar kanska øgiligt, at Landsverkfrø›ingurin fer at kanna infrastrukturin í Koltri. Men Oyvindur Brimnes, landsverkfrø›ingur, sigur, at talan er ikki um at fara undir naka› stórarbei›i har úti.

Í grundini fer Landsverkfrø›ingurin als einki arbei›i at gera í Koltri, sigur hann. Stovnurin er bi›in um at kanna, hvussu tyrlupallurin kann flytast, og ein

møguligur vegstubbi gerast í samband vi› fornfrø›iligu kanningarnar í Koltri.

Leikluturin hjá Landsverkfrø›inginum er bert at rá›geva og meta um møguligan kostna›, sigur Oyvindur Brimnes.

Bjarni Djurholm, landsst‡risma›ur í vinnumálum, sum eisini umsitur samfer›sluna, sigur, at talan er um eitt mál, sum var› sett í gongd fyri hansara tí› sum landsst‡risma›ur.

Hann veit tí heldur ikki so øgiliga nógv um máli›, sigur hann. Men váttar tó, at ætlanin er at gera n‡ggjan tyrlupall. Pengar eru umbidnir á fíggjarlógini til tess.

Um vegager› í Koltri sigur landsverkfrø›ingurin, at talan er um ein vegstubba millum gamla b‡lingin, sum arbeitt ver›ur vi› at var›veita, og eitt sonevnt teknikarahús, sum ætlandi ver›ur reist í Koltri í samband vi› fornfrø›iliga arbei›i› í oynni.

VI‹MERKINGAR

Ein søga um ærumei›ing

Í Sosialinum 8. november er grein undir yvirskriftini »Útvarpi› bi›ur um umbering«.

Greinin umrø›ur ein stuttan tátt, sum var› sendur í ÚF á midnátt leygarkvøldi› 28. oktober.

Innihaldi› í hesum tátti metti Jóannes Eidesgaard, forma›urin í Javna›arflokkinum, løgtingsma›ur og fólkatingsma›ur, vera ærumei›andi móti sær. Hann kravdi tí eina umbering frá ÚF, annars fór hann at stevna útvarpsstjóranum fyri ærumei›ing.

Eftir at hava kanna› innihaldi› í hesum tátti, var› lætt at sta›festa, at ta› lá uttanfyri tær reglur, sum galda fyri programmvirksemi› hjá ÚF. Tí var heldur ikki torført at siga Jóannes Eidesgaard frá hesum, og geva honum ta umbering, sum hann kravdi. Samstundis var› avtala›, at máli› var› avgreitt, tá ÚF hev›i sagt frá hesum í tí›indasendingini mánakvøldi›. Jóannes Eidesgaard kravdi, at hetta var› kunngjørd í eini tí›indasending,

hóast vanlig mannagongd hev›i veri›, at hetta var› sagt á sama sta›i, tvs. í sambandi vi› táttin á midnátt leygarkvøld.

Mikudagin tekur Sosialurin máli› upp, og prinsipielt havi eg eitt sindur ilt vi› at skilja, at tann ærumeiddi í hesum føri — eftir at máli› er avgjørt vi› semju - medvirkar í at fáa enn meira umrø›u av ærumei›ingini, m.a. vi› at lata bla›num skjølini í málinum.

Ta› er nú ikki tí, at eg kenni meg noyddan til at skriva hesar reglur. Í greinini í Sosialinum ver›ur ein navngivin persónur lagdur undir at hava sta›i› fyri hesum tátti. Ta› er ikki rætt. Vi›komandi leg›i rødd til at lesa tekstin, og annan lut átti hann ikki í hesum tátti. Nú stendur Sosialurin helst fyri tørni at geva eina umbering.

Lat meg so eisini brúka hetta høvi til at minna á, at ábyrgdarlóggávan á økinum liggur í órøkt. Í 1992 spurdi løgmálará›i› heimast‡ri›, um ta› vildi hava donsku fjølmi›laábyrgdarlógina setta í gildi í Føroyum. Í 1997 svara›i landsst‡ri›, at ta› vildi heimast‡ri›, men nakrar broytingar skuldu gerast í lógini. Millum anna› skuldi staturin rinda fyri eina føroyska si›anevnd fjølmi›lanna, og nevndin skuldi skipast og mannast ø›rvísi, enn ásett er í donsku lógini. Ta› kundi løgmálará›i› ikki ganga vi› til.

Í ár samtykti løgtingi› so at taka aftur tilmæli› um at seta donsku lógina í verk. Føroyar skulu gera sína egnu lóg um ábyrgdina hjá fjølmi›lunum. Men trupulleikin er, at heimast‡ri› hevur ikki yvirtiki› málsøki› fjølmi›laábyrgd sum sermál. Ta› helt landsst‡ri› fyrr í ár ikki vera ney›ugt, tí ríkisrættarliga stø›an hjá Føroyum var› greidd sí›st í árinum. Men ta› ver›ur hon sum kunnugt ikki.

Ein ábyrgdarlóg er ein fyritreyt undir føroysku kringvarpslógini, sum var› sett í gildi í 1998. Sjálvur haldi eg, at ta› er frægari at brúkt eina danska lóg fyribils, heldur enn at ongar skipa›ar reglur eru um ábyrgd fjølmi›lanna. Mær kunnugt víkir danska fjølmi›laábyrgdaskipanin ikki grundleggjandi frá skipanunum í hinum nor›urlondunum.

Útvarp Føroya
Jógvan Jespersen

Vi›merking

Ta› var okkum ikki kunnugt, at upplesarin av umrødda tátti í útvarpinum á midnátt leygarkvøld ikki hev›i skriva› tilfari› sjálvur. Hetta tóku vit sum givi›, tá einki anna› var› annonsera› undan táttinum. Vit hava tí gjørt Ega Dam órætt og bi›ja hann halda okkum til gó›ar. Hinvegin vilja vit eisini gera vart vi›, um ta› ikki hev›i veri› rættari av útvarpinum í slíkum føri at kunngjørt, hvør rithøvundin er til henda táttin. Um og nær ta› er upplesarin sjálvur ella ta› er onkur annar! Ta› er líksum vi› teimum dulnevndu lesarabrøvunum, so kanska hetta var vert hjá útvarpinum at umhugsa. Tá var lutvíst sloppi› undan slíkum misskiljingum. Eg ivist ikki í, at mong onnur, sum hoyrdu táttin hetta kvøldi›, mundu hugsa›, at upplesarin sjálvur hev›i skriva› táttin, tí anna› var› ikki uppl‡st.

Hvat vi›víkur leiklutinum hjá Jóannesi Eidesgaard í hesum máli skal ver›a sagt, at hann hevur ikki lati› bla›num naka› tilfar í málinum, men hevur bert svara› spurningum, sum bla›i› setti honum.

Annars skal undirrita›i geva starvsfelaganum í Sortud‡ki rætt í, at ta› er óheppi›, at mi›larnir í Føroyum liggja í fjølmi›laábyrgdarloysi, tí lógin um fjølmi›laábyrgd ikki er sett í gildi enn. Ta› er sjálvandi eitt ærligt ynski, tá landsst‡ri› vil bí›a at seta slíka lóg í gildi, til vit hava yvirtiki› málsøki›, men tá ta› er óvist, nær hetta kann henda, so vildi veri› rætt at sett donsku lógina í gildi í hvussu er fyribils.

Vinarliga

Sosialurin
Jan Müller

Tí›indaskriv

Ársins DJ á Strondum

Kappingin Ársins DJ 2001 var seinasta leygarkvøld í bygdarhúsinum á Strondum, har innlei›andi umfari› fyri Eysturoynna var› hildi›.

Tríggir luttakarar vóru: CD Single, DJ Mood og Yazz.

Dómarar og ásko›arar vóru á einum máli um, at DJ Mood og CD Single skulu umbo›a eysturoynna í finaluni, i› ver›ur í Havn í januar.

Komandi Fríggjakvøld 10. november, ver›ur Ársins DJ 2001 í Lognbrá í Klakksvík, har Jógvan Á Høvdanum y., Dj Eyes not ice og Kristian Joensen fara at kappast um at umbo›a Nor›oyggjar í finaluni.

Tí›indaskriv

Kvinnupolitisk kvøldseta á Gamla Meiarínum

Fríggjakvøldi› tann 17. nov. kl. 20 skipar Kvinnufelagi› í Havn fyri kommunalpolitiskum fundi og kvøldsetu ni›ri á Gamla Meiarínum.

Kvinnulig valevni umbo›andi allar flokkar til b‡rá›svali› í Tórshavnar Kommunu eru bo›in at luttaka vi› innleggum í or›askifti, og undirhald ver›ur bæ›i til álvara og gaman.

Aftaná ver›ur høvi› at halda fram vi› or›askifti í smærri bólkum aftur vi› drekka og brey›bitum, sum vera til keyps seinni um kvøldi›.

Neyvari skrá ver›ur l‡st seinni.

HEIMA BIO

The Beach


Mission to Mars

VIDEOTOP 10

VIKA 45
1 Mission to Mars
2 The talented Mr. Ripley
3 The Beach
4 Three Kings
5 American Beauty
6 Double Jeopardy
7 Anna og Kongen
8 Robotmennesket
9 Sleepy Hollow
10 Er du til noget

Í Gundadali tel. 31 47 70
Í Kollafirði tel. 42 10 83
Í Saltangará tel. 44 91 33
Í Klaksvík tel. 45 73 53
Í Sørvági tel. 33 20 01
Í Leirvík tel. 44 33 60
Í Skálafirði tel. 44 12 00

STATOIL
støðirnar kring landið

petur & petur 320870